gult2 cyan2 magenta2 svart2



## DAGSINS MEINING

### Líkasæla á íbúðaøkinum

Tíverri hava vit ta skomm at dragast við, at fleiri limir í okkara løggevandi tingi, leggja sektin á íbúðaviðurskifti okkara. Hetta kom greitt til sjóndar, tá uppskotið til samtyktar frá Heðini Mortensen, løgtingsmanni, var til 1. viðgerð. Menn høvdu hug at smírast, gera gjøldur burtur úr uppskotinum og hildu tað vera ov lítið ítøkiligt.

Gamaní. Men talan var um eitt uppskot til samtyktar, har heitt verður á landsstýrið um at skipa so fyri, at vit fáa ein meiri skipaðan íbúðapolitikk, við m.a. alternativum loysnum, og við íbúðamøgulekum fyri fólk við serligum tørvi. Er tað nakað, sum veruliga vantar í føroyskum politikki, so er tað ein veruligur íbúðapolitikkur, sum gevur fólki møguleikar at velja, og sum gevur øllum møguleika at fáa ein bústað, líka mikið, hvussu høg ella lág inntøkan er.

Vit kunnu ásanna, at vit eru rokin langt at byggja upp eitt vælferðarsamfelag, har pláss er fyri øllum. Men tá tað snýr seg um ein íbúðapolitikk, eru vit komin stutt áleið, hóast Íbúðagrunnurin hevur gjørt nakrar royndir og er uppi í nøkrum ætlanum.

Vit mugu gera okkum greitt, at skulu vit byggja íbúðir, t.d. at leiga út, so er neyðugt, at tað almenna letur ein part av eginpeninginum, t.d. umvegis Íbúðagrunnin, tí annars verður leigugjaldið so høgt, at eingin megnar at leiga eina slíka íbúð. Øðrvísi er, um talan er um eigaraíbúðir. Eina slíka eiga fólk, tey gjalda rentur og avdrøg, fáa rentustuðul, sum lækkar mánaðarligagjaldið, og tey kunu selja hana fyrr ella seinni og fáa avlopið.

Tað er einki annað enn ein stór skomm, at føroyska samfelagið ikki hevur ymsar íbúðamøguleikar at bjóða fólki, t.d. einligum við børnum. Hesi hava ikki møguleika, sum er, at útvega sær hús, tí ein inntøka ber bara eini 600.000 krónur í láni. Men tey, sum koma í eina slíka støðu ikki at hava tak yvir høvdið, eru latin upp til skutils hjá teimum, sum leiga út kjallara ella loftsíbúðir, ofta fyri eina høga leigu, og uttan leigusáttmála.

Á hesum øki er anarki, lógarloysi, og tí mugu vit vóna, at tingfólk okkara taka henda spurning í nógv størri álvara enn 1. viðgerð sýndi. Hóast samhaldsfesti ikki eyðkennir verandi meirilutan á tingi, fær hetta uppskot vónandi dygga undirtøku! Annars er skommin fullkomin.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI



### 20 ár í FK

Tað var eingin aprílsøga, tá Astrid Svøðstein sunnudagin kundi halda ein rundan dag sum starvsfólk í Keypsamtøkuni í Klaksvík. 1. apríl hevði Astrid starvast 20 ár hjá FK í Klaksvík. Viðskiftafólk í Keypsamtøkuni munnu mangan hava avgreitt síni ørindi umvegis kassan hjá Astrid,og tað koma tey eisini at gera framyvir, tí Astrid heldur sjálvandi fram í arbeiði sínum í FK.

# 7.000 fólk vitja framsýningina hjá kvøldskúlanum



*Bókbinding hevur verið ein rættuliga vældámdur partur av kvøldskúlaundirvísingini í Havn*
*Savnsmynd*

KVØLDSKÚLI
*Eirikur Lindenskov*

Í morgin og sunnudagin – pálmasunnudag, skipar Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli fyri árligu framsýningini, har fólk, ið hava gingið á handaligu linjum kvøldskúlans, sýna fram tað, tey hava gjørt hendan veturin.

Hetta er 26. ferðin, at kvøldskúlin í Havn skipar fyri framsýning á henda hátt.

– Kvøldskúlin er eldri enn so, men tað var í 1975, at vit fóru undir hetta slagið av framsýning, sum fyrstu tíðina var á Læraraskúlanum. Síðani Eysturskúlin kom, hevur framsýningin verið har, sigur Napoleon Nólsoy, leiðari skúlans.

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli hevur fleiri enn teir umleið 70 handaligu flokkarnar. Tilsamans hevur skúlin um 275 flokkar. Í skúlanum ganga um 3.000 næmingar, sum halda til á 36 ymiskum støðum í Havnini. Lærararnir eru 170 í tali.

Av handaligu lærugreinunum kann nevnast, at skúlin skipar fyri undirvísing í seyming, smíð, bókbinding, maskinbinding, vevnaði. Eisini hevur kvøldskúlin ein listarskúla, Tórshavnar Listarskúla, sum heldur til í gomlu húsunum hjá Kaj Petersen í Kongagøtu 7 í Havn. Har verður undirvíst í ymsum listarligum greinum, so sum modelltekning, málning, fotolæru, videolæru o. ø..

Í vóru um 7.000 fólk og vitjaðu framsýningina, sum er vorðin fastur táttur vikuskiftið fyri páskir.

## Tøkk

Øllum tykkum, ið mintust okkum á diamantbrúdleypsdegnum, takka vit hjartaliga.

*Kærar heilsanir*
**Greta og Carl**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult3 cyan3 magenta3 svart3




# Sosialurin fyrstur á gøtuni

## Fæst í leysasølu kring landið kl.:




## Fá blaðið í postkassan kl. 19.00

Teir haldarar ið hava postnummar 100, 160, 187, 188, hava nú møguleika at fáa blaðið borið til dymar kl. 19.00. Fyll lepan út og send hann til okkum.

Sosialurin

ÓKEYPIS

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn:
Bústaður:
Postnr., bygd, býur:
Tlf:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ 5 bløð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.